Skráseting Føroya

**Frágreiðing viðvíkjandi roknskapareftirliti av innkomnum ársfrásagnum í 2024**

Frágreiðingin viðgerð úrslitið av roknskapareftirlitinum av innkomnum ársfrásagnum í 2024.

Tann 31. desember 2023 vóru 4.084 feløg skrásett í partafelagsskránni hjá Skráseting Føroya. 39% av feløgunum høvdu grannskoðara skrásettan, meðan 61% vóru skrásett uttan grannskoðara.

Skráseting Føroya ger hvørt ár eftirlit við ársfrásagnunum hjá skrásettu feløgunum. Árliga roknskapareftirlitið er býtt í tvey. Eitt móttøkueftirlit, ið hevur til endamáls at lúka mest sjónligu feilirnar burtur, og síðani stakroyndir samsvarandi § 159 í ársroknskaparlógini, sum er ein gjøllari gjøgnumgongd av útvaldum ársfrásagnum.

Endamálið við roknskapareftirlitinum hjá Skráseting Føroya er fyrst og fremst at tryggja, at tær ársfrásagnir, sum feløg senda inn, eru rættar. Harumframt verður kannað, um aðrar upplýsingar, sum felagið hevur fráboðað til Skráseting Føroya, samsvara við ársfrásøgn felagsins. Tað vil siga viðtøkur, fráboðan um eigarar, grannskoðaraviðurskiftir og hvussu felagið annars er skrásett í partafelagsskránni.

**Úrslit frá stakroyndunum samsvarandi § 159 í ársroknskaparlógini:**

Í 2024 vóru 65 ársfrásagnir frá roknskaparárinum 2023 kannaðar sum stakroyndir. Harav 30 við grannskoðara skrásettum í skipanini hjá Skráseting Føroya og 35 uttan grannskoðara skrásettan í skipanini hjá Skráseting Føroya. Hetta var áleið 1,6% av samlaðu feløgunum.
Av teimum 35 feløgunum, sum høvdu valt grannskoðan frá, høvdu 12 fingið hjálp frá grannskoðara at seta roknskapin upp, ímeðan tveir ársroknskapir vóru grannskoðaðir, hóast grannskoðan var frávald sambært skrásetingunum hjá Skráseting Føroya.

Niðanfyri standandi talva vísir býtið av viðurskiftum, sum Skráseting Føroya hevði viðmerkingar til, í sjey bólkar:

| Viðurskifti | Ársfrásagnir | í % |
|---|---|---|
| **1. Nýttur roknskaparháttur** | **12** | **18%** |
| **2. Forklárandi notur** | **7** | **11%** |
| **3. Manglandi partar av ársfrásøgnini** | **4** | **6%** |
| **4. Skemakrøv ikki fylgd** | **3** | **5%** |
| **5. Skeiv binding av eginogn** | **7** | **11%** |
| **6. Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** | **1** | **2%** |
| **7. Partaeigaralán** | **4** | **6%** |

**Nýttur roknskaparháttur** – Sambært ársroknskaparlógini skulu ársfrásagnir millum annað innihalda nýttan roknskaparhátt. Nýttur roknskaparháttur skal innihalda viðkomandi upplýsingar um innrokningarhátt og mátigrundarlag, sum eru nýtt fyri upphæddirnar í fíggjarjavna, rakstrarroknskapi, notum og møguligari leiðslufrágreiðing. Harundir eisini avskrivingarhátt fyri støðisøgn.
Skráseting Føroya ger viðmerkingar til ársfrásøgnina, um fíggjarstøða og rakstur ikki samsvara við tað, sum er lýst í nýttum roknskaparhátti, hetta bæði tá ov lítið er lýst og um ov nógv viðurskifti verða lýst í nýttum roknskaparhátti, sum ikki eru viðkomandi fyri ársfrásøgnina.
Í hesum roknskapareftirlitinum gjørdi Skráseting Føroya vegleiðingarskriv til 12 feløg sum antin høvdu ov fáar ella ov nógvar upplýsingar í nýttum roknskaparhátti.
Umframt tær 12 viðmerkingarnar um ov fá ella ov nógv lýst viðurskifti, so eru í somu ársfrásagnum staðfest í fýra førum, at upplýsingar mangla um innrokning og mátigrundarlag sambært § 53, stk 1 í ársroknskaparlógini.
Eisini eru aðrir feilir staðfestir í nýttum roknskaparhátti, sum til dømis, at upplýst er ikki um, hvønn roknskaparflokk ársfrásøgnin er gjørd eftir, og í eina førinum er restvirðið á bygningi ásett til 100% av útveganarvirðinum.

**Forklárandi notur** – Skráseting Føroya kom í sambandi við eftirlitið fram á sjey ársfrásagnir, har manglar vóru í notunum. Fýra av hesum høvdu ikki upplýst um høvuðsvirksemi felagsins í roknskaparárinum. Sambært § 76a í ársroknskaparlógini skal felagið lýsa høvuðsvirksemi felagsins í ársfrásøgnini. Hetta í notunum ella í leiðslufrágreiðingini, um felagið hevur eina slíka.
Trý feløg hava ikki greitt frá um flytingar í eginognini sambært § 56 í ársroknskaparlógini.

**Manglandi partar av ársfrásøgnini** – Fýra ársfrásagnir høvdu manglar. Í eina førinum manglaði fundarstjóri á forsíðuni, umframt at leiðsluátekningin ikki var mett at lúka ásetingarnar til leiðsluátekningar í § 9, stk 1 í ársroknskaparlógini. Felagið hevur fingið vegleiðing um at fáa hesi viðurskifti í rættlag í næstu ársfrásøgn felagsins.
Í ársfrásagnunum hjá tveimum feløgum varð ikki mett, at leiðslufrágreiðingin leyk ásetingarnar í ársroknskaparlógini um innihaldi av leiðslufrágreiðingini. Í eina førinum manglaðu nakrar upplýsingar sambært § 99, stk 1, meðan tað í hinum førinum manglaði yvirlit yvir høvuðs- og lyklatøl sambært § 101, stk 1. Feløgini hava fingið vegleiðing um at fáa hesi viðurskifti í rættlag í næstu ársfrásøgn felagsins.
Ein ársroknskapur var ikki grannskoðaður, hóast felagið ikki leyk treytirnar fyri at velja grannskoðan frá.
Sambært § 135, stk 2 í ársroknskaparlógini kann ein fyritøka í roknskaparflokki B velja grannskoðan frá um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 1 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 2 mió. kr., og
3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Tað vil siga, at fyritøkan í eitt ár kann fara uppum hesi mørk, um hon tað næsta árið aftur er niðanfyri mørkini. Men fara tølini í fyritøkuni upp um nevndu mørk tvey fylgjandi ár, skal seinna árið grannskoðast.

Felagið, sum ikki leyk treytirnar at velja grannskoðan frá, men ikki hevði latið ársroknskapin grannskoða, var biðið um at lata nýggjan grannskoðaðan ársroknskap inn til Skráseting Føroya.

**Skemakrøv ikki fylgd**
Hjá trimum av útvaldu ársfrásagnunum varð viðmerkt, at ársfrásøgnin ikki varð sett upp eftir skemakrøvunum í ársroknskaparlógini. Her var mett, at talan var um størri frávik, og tí hava feløgini fingið vegleiðing um at fáa hesi viðurskifti í rættlag í næstu ársfrásøgn felagsins.

**Skeiv binding av eginogn**
Í sambandi við roknskapareftirlitið kom Skráseting Føroya fram á sjey ársfrásagnir, har feilir vórðu staðfestir í sambandi við uppgerð av eginognini hjá útvaldu feløgunum.
Í tveimum førum var talan um brot á serligu reglurnar fyri binding av eginogn hjá íverksetarafeløgum. Í øðrum førinum var ongin partur av ársyvirskotinum hjá íverksetarafelag bundin sum tiltakspeningur, sum ásett í § 35 c í ársroknskaparlógini. Í hinum førinum hevði felagið í sambandi við eitt undirskot tømt serliga tiltakspeningin fyri íverksetarafeløg, sum áður varð bundin.
Fimm av stakroyndunum vístu feilir við uppgerðini av eginognini í sambandi við "Grunn fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum". Í trimum førum var als ongin grunnur fyri nettouppskriving eftir innaravirðisháttinum, hóast dótturfeløg vórðu innroknað til innaravirði.
Í onkrum av hesum førunum varð enntá upplýst í nýttum roknskaparhátti, at virðisjavningin av innaravirðinum varð bundin í tiltaksgrunni í eginognini, men hetta var tó ikki gjørt.
Í tveimum førum var munur á bundnu upphæddini í eginognini og virðisjavningini av innaravirðinum av dótturfeløgunum.

Býtt yvir tey feløg, sum høvdu valt grannskoðan frá, fingið roknskaparhjálp og vóru grannskoðaði, var býtið av úrslitinum av eftirkannaðu ársfrásagnunum hetta:

| | | Frával<br>21 | Roknskaparhjálp<br>12 | Grannskoðað<br>32 |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Nýttur roknskaparháttur | 33% | 17% | 9% |
| 2. | Forklárandi notur | 24% | 0% | 9% |
| 3. | Manglandi partar av ársfrásøgnini | 10% | 0% | 6% |
| 4. | Skemakrøv ikki fylgd | 14% | 0% | 0% |
| 5. | Skeiv binding av eginogn | 14% | 0% | 13% |

Skráseting Føroya tók 30 feløg, sum høvdu grannskoðara skrásettan, út til eftirlit. Hesir ársroknskapirnir vóru allir grannskoðaðir, umframt at tveir ársroknskapir, sum vóru skrásettir sum at grannskoðan var frávald, eisini vóru grannskoðaðir. Prosenttølini í talvuni omanfyri eru gjørd útfrá 32 grannskoðaðum ársroknskapum. 12 ársfrásagnir vóru settar upp við hjálp frá grannskoðara. 21 ársfrásagnir vóru settar upp uttan hjálp frá grannskoðara.

Úrslitið vísti, at av teimum 65 eftirkannaðu feløgunum høvdu ársfrásagnir hjá teimum smærru feløgunum, sum luku treytirnar at velja grannskoðan frá í 33% og 17% av førunum staðfestar feilir í sambandi við nýttan roknskaparhátt. 32 av teimum eftirkannaðu ársroknskapunum vóru grannskoðaðir, og av hesum høvdu tríggir - sum er 9% - staðfestar feilir í sambandi við nýttan roknskaparhátt.

Í samband við forklárandi notur høvdu 24% av teimum 21 eftirkannaðu feløgunum, sum høvdu frávalt grannskoðan, fingið viðmerkingar frá Skráseting Føroya og ongin av eftirkannaðu feløgunum, sum høvdu fingið hjálp frá grannskoðara at seta ársfrásøgnina upp. 9% av teimum 32 grannskoðaðu ársroknskapunum fingu viðmerkingar frá Skráseting Føroya í sambandi við forklárandi notur.

10% av ársfrásagnunum, har grannskoðan var frávald, høvdu manglandi partar av ársfrásøgnini. Ongin av teimum 12 ársfrásagnunum hjá smærri feløgunum, har grannskoðarar høvdu veitt roknskaparhjálp til uppseting av ársfrásøgnini, manglaðu partar av ársfrásøgnini. Í hesum eftirlitinum kom Skráseting Føroya fram á tveir grannskoðaðar ársroknskapir, sum høvdu manglar. Hetta svarar til 6% av úttiknu ársfrásøgnunum.

Í trimum ársfrásøgnum vórðu týðandi frávik frá skemakrøvunum staðfest. Í øllum trimum førum var talan um ársfrásagnir, har grannskoðarar hvørki høvdu grannskoðað ella veitt roknskaparhjálp.

Viðvíkjandi skeivari binding av eginognini eru feilir staðfestir í sjey førum, og hesir feilir fordeila seg millum ikki grannskoðaðar ársfrásagnir (14%) og grannskoðaðar ársroknskapir (13%). Feilir viðvíkjandi skeivari binding av eginogn vóru ikki staðfestir hjá nakrari ársfrásøgn, har grannskoðarar hava veitt roknskaparhjálp.

**Fráboðan til Skráseting Føroya manglar**

Í sambandi við eftirlitið kannaði Skráseting Føroya eisini um upplýsingar, sum vóru skrásettar í partafelagsskránni, vóru rættar. Harundir til dømis grannskoðaraviðurskifti, viðtøkur og fráboðan um eigarar.

Í 2024 kom Skráseting Føroya fram á tað eina felagið, sum ikki hevði fingið øll hesi viðurskiftini í rættlag. Her var talan um val av nýggjum grannskoðara, sum ikki var fráboðað til Skráseting Føroya.

**Partaeigaralán**

Í sambandi við eftirlitið kom Skráseting Føroya fram á fýra feløg, sum høvdu partaeigaralán. Partaeigaralán er millumrokning ímillum felagið og leiðslu, eigarar ella onnur nærstandandi hjá felagnum. Partaeigaralán eru ólóglig og skulu afturgjaldast við rentum.

Tað eina partaeigaralánið, sum Skráseting Føroya kom fram á í sambandi við roknskapareftirlitið hesaferð, var hjá felagi, har ársroknskapurin var grannskoðaður. Her hevði grannskoðarin viðmerkt partaeigaralánið í grannskoðaraátekningini, og at partaeigaralánið bæði var renturoknað og afturgoldið.

Í tveimum førunum var talan um ársfrásagnir, sum vóru uppsettar av grannskoðara, og í ongum av førunum er upplýst, at áognin er afturgoldin. Í báðum førum er upplýst í notu um lánið, har í øðrum førinum er upplýst, at renta er roknað av áognini, meðan tað í hinum førinum er upplýst, at ongin renta er roknað.

Í einum føri er partaeigaralán staðfest hjá felagi, har grannskoðan er frávald. Í hesum førinum var einki upplýst um renturokning ella afturgjalding.

*Serligt átak í 2024 viðvíkjandi partaeigaralánum*

Umframt stakroyndirnar frá árliga roknskapareftirlitinum, so hevur Skráseting Føroya gjørt eitt serligt átak í 2024 viðvíkjandi ólógligum partaeigaralánum. Úrslitið av hesum átakinum var, at 14 feløg hava fingið skriv um at senda váttan til Skráseting Føroya, um at partaeigaralánið er afturgoldið.

Hjá øllum 14 feløgunum varð upplýst í ársfrásøgnini, at talan var um partaeigaralán og grannskoðarin hevði í grannskoðaraátekningini gjørt vart við, at hetta er ólógligt sambært § 210 í vinnufelagalógini.

Í helvtini av ársfrásagnunum varð upplýst, at partaeigaralánið verður afturgoldið við vinningsbýtið í 2024 og í hinari helvtini varð einki upplýst um afturgjalding. Skráseting Føroya hevur í báðum førum biðið um váttan frá grannskoðara og leiðsluni í felagnum, at ólógliga partaeigaralánið er afturgoldið felagnum saman við lógarkravdu rentunum.

Niðanfyristandandi talva vísir úrslitið av manglandi fráboðanum og partaeigaralánum í eftirkannaðu feløgunum:

| | Ársfrásøgn | í % |
|---|---|---|
| **6. Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** | **1** | **2%** |
| **7. Partaeigaralán** | **4** | **6%** |

Bert tað eina felagið var skeivt skrásett í partafelagsskránni hjá Skráseting Føroya, og hetta svarar til 2% av kannaðu feløgunum. Tað er ábyrgdin hjá leiðsluni í felagnum at fráboða broytingar til Skráseting Føroya. Í mun til undanfarna ár er talan um stóran bata, tá staðfestu manglarnir vóru átta í tali.

Skráseting Føroya fekk í sambandi við eftirlitið kunnleika til fýra partaeigaralán, hetta er umleið 6% av kannaðu feløgunum. Tað eina partaeigaraláni varð upplýst í grannskoðaðum ársroknskapi, meðan tvey partaeigaralán vórðu upplýst í ársfrásagnum, sum vóru settar upp av grannskoðara. Eitt partaeigaralán varð upplýst í ársfrásøgn, sum hevði frávalt grannskoðan og heldur ikki sett upp av grannskoðara.

**Móttøkueftirlit 2024**

Skráseting Føroya ger móttøkueftirlit av ársfrásagnunum, sum verða latnar inn. Í móttøkueftirlitinum verða ársfrásagnirnar latnar upp og hugt verður leysliga at, um ársfrásagnirnar síggja út til at vera í lagi og um tær lúka krøvini í ársroknskaparlógini til uppseting.

Í sambandi við móttøkueftirlitið við ársfrásagnum, sum vóru móttiknar í 2024 hevur Skráseting Føroya biðið 16 feløg um at lata inn nýggjar ársfrásagnir, tí tær ikki kundu metast at vera ársfrásagnir, sum uppfyltu treytirnar í ársroknskaparlógini. Harav ein sum ikki leyk treytirnar at velja grannskoðara frá. Felagið sum ikki leyk treytirnar at velja grannskoðara frá, var eitt smápartafelag, meðan tey 15 feløgini, sum Skráseting Føroya avvísti ársfrásagnirnar hjá, tí tær ikki kundu góðkennast, sum ársfrásagnir, sum luku treytirnar í ársroknskaparlógini, øll vóru íverksetarafeløg. Av hesum lótu 11 feløg nýggja ársfrásøgn inn, sum kundi góðkennast, harav høvdu tvey biðið um hjálp frá grannskoðara at seta ársfrásøgnina upp.

Trý av feløgunum valdu at taka felagið av sambært § 216 í Vinnufelagalógini, meðan eitt av feløgunum varð sent til tvingsilsavtøku vegna manglandi roknskap.

Skráseting Føroya hevur enn samskifti við tvey av feløgunum, og støða er tískil ikki tikin til, hvat niðurstøðan viðvíkjandi teimum verður.

**Samanumtøka**

Í sambandi við roknskapareftirlitið kann Skráseting Føroya vísandi til § 161 í ársroknskaparlógini: 1) vegleiða, 2) átala og 3) krevja, at feilir verða rættaðir.

Roknskapareftirlitið av ársfrásagnum í 2024 hevur havt við sær, at Skráseting Føroya hevur sent 19 vegleiðingarskriv, givið 1 átalu og krav 1 feil rættaðan.

Í sambandi við eftirlitið av grannskoðaðu ársroknskapunum hevur Skráseting Føroya valt at vegleiða um viðurskifti hjá átta feløgum.

Skráseting Føroya hevur sent vegleiðingarskriv til fýra feløg, har grannskoðari hevur veitt roknskaparhjálp til uppseting av ársfrásøgn.

Av ársfrásagnum, sum ikki eru grannskoðaðar og grannskoðari heldur ikki hevur veitt roknskaparhjálp til uppseting, hevur Skráseting Føroya sent vegleiðingarskriv til sjey feløg, sent átalu til eitt felag og biðið um nýggja ársfrásøgn frá einum felagi.

Umframt stakroyndirnar, hevur Skráseting Føroya í sambandi við móttøkueftirlitið við ársfrásagnum, sum vóru móttiknar í 2024 biðið 16 feløg um at lata inn nýggjar ársfrásagnir, tí tær ikki kundu metast at vera ársfrásagnir, sum uppfyltu treytirnar í ársroknskaparlógini.

Skráseting Føroya hevur, umframt vanligu eftirlitini í 2024, gjørt eitt serligt átak viðvíkjandi ólógligum partaeigaralánum. Úrslitið av átakinum var, at 14 feløg hava fingið áheitan um at senda váttan til Skráseting Føroya um, at partaeigaralánið er afturgoldið við lógarkravdum rentum.

Lógarásett støddarmørk gera, at tað bert eru smærri feløg, sum kunnu frávelja grannskoðan av ársroknskapi. Ársfrásagnirnar hjá hesum smærru feløgunum kunnu sum heild metast at verða meira einfaldar enn ársfrásagnirnar hjá størru feløgum, og sostatt kunnu sannlíkindi fyri feilum eisini metast at verða lægri hjá smærri feløgum, sum kunnu frávelja grannskoðanina. Hóast hetta verður úrslitið frá roknskapareftirlitinum í 2024 mett at geva greiðar ábendingar um, at lutfalsliga nógv fleiri feilir eru staðfestir í útvaldum ársfrásagnum, har grannskoðan er frávald.

Samanumtikið verður mett, at roknskapareftirlitið í 2024 gevur ábendingar um, at grannskoðaðu ársroknskapirnir hava munandi færri feilir enn teir, har grannskoðan er frávald. Hóast stakroyndirnar ikki eru so nógvar av feløgunum, har grannskoðari hevur veitt roknskaparhjálp til at seta upp ársfrásøgnina, so eru greiðar ábendingar um, at færri feilir eru hjá hesum feløgunum í mun til hjá teimum felgunum, sum hava frávalt roknskaparhjálp og grannskoðan.